# nýhugsan



*Tjóðveldisfólk lurta við áhuga eftir formannin, tá ið hann leggur síni sjónarmið fram*

Men hann helt eisini, at íløgur í okkara mentan og mentanartilboð eru eins týdningarmiklar.

– Í altjóðagerðini er neyðugt, at vit ikki bert hugsa um sjálva tøknina. Vit skulu eisini hugsa um innihaldið og virðini, sum vit skulu brúka tøknina til.

Okkara børn og ungdómur skulu dubbast til at gerast heimsborgarar, læra fleiri heimsmál og vinna sær nýggja vitan. Men tað hevur ongantíð verið meira neyðugt enn nú, at vit eisini styrkja okkara egna mál og mentan til at gerast ein nútímans mentan í heiminum.

At vit fáa føroyskt undirvísingartilfar, føroyskt sjónvarp, føroyskar bøkur og føroyskt mál inn í heimssamfelagið.

Tað er ein fortreyt fyri at gagnnýta altjóðagerðina, at vit styrkja okkara egna grundarlag, samstundis sum vit lata okkum upp mótvegis umheiminum.

Somuleiðis eiga vit at taka alla okkara útbúgvingarskipan til endurskoðanar í innihaldi, bæði fólkaskúlalóg eins og barnagarðs- og dagstovnaøkið skal samskipast meira við skúlan.

Okkara miðnámsskúlaskipan má endurskoðast og gerast munandi meira liðilig við bæði vinnuligum og bókligum møguleikum. Málið eigur at vera, at yvir eitt ávíst áramál hava allir føroyingar eina miðnámsútbúgving.

Og vit skulu sjálvsagt hava eitt veruligt fróðskaparsetur, sum kann gerast eitt kraftsentur fyri gransking og hægri útbúgvingum og sum samstarvar við hægri skúlar kring allan heim.



# Tjóðveldisflokkurin biður um fólksins stuðul

**Á flokstingið í Sumba hetta vikuskiftið er niðurstøðan hjá Tjóðveldisflokkinum, at stórar avbjóðingar standa fyri framman og tí biðjur hann um fólksins stuðul til at fremja umfatandi broytingar**

**Yvirlýsing**

Á flokstinginum varð ein yvirlýsing samtykt, har flokkurin visir til ta dyggu undirtøku, sum veljarin hevur víst flokkinum á teimum seinastu valunum og við tí í huga, heitir flokkurin á føroyingar um stuðul, til

- at seta á stovn einar sjálvstøðugar Føroyar, sum í alheimsgerðini kunnu virka á jøvnum føti millum heimsins tjóðir
- at vinna føroyingum somu viðurkenning sum tjóð sambært fólkarættinum, sum grønlendingar hava vunnið sær fyri stuttum
- at fáa økt samstarv og fleiri samstarvsavtalur við onnur lond á øllum økjum
- at fremja veruligan vinnupolitikk við ítøkiligum stutt- og langtíðarætlanum
- at fáa tillaging, menning og nýskapan innan høvuðsvinnuna
- at menna alternativar vinnur við góðum og javnbjóðis kørmum
- at rudda upp í lógini um vinnuligan fiskiskap
- at umleggja Framtaksgrunnin til ein veruligan framtaksgrunn, ið millum annað skal menna øll økini í landinum
- at einskilja almennar vinnuligar fyritøkur og nýta inntøkuna til afturrindan av skuld og til gransking og menning
- at seta á stovn Búskapargrunn Føroya
- at veita munandi betri karmar og meira fígging til gransking, Fróðskaparsetrið og nýhugsan
- at endurskoða alla føroysku útbúgvingarskipanina - frá fólkaskúla til hægri lesnað og eftirútbúgvingar
- at stuðla mentanarligari menning í øllum landinum
- at tryggja okkum eitt framkomið almanna- og heilsuverk
- at fáa í lag breiða semju um nýggja føroyska eftirlønarskipan skjótast tilber
- at styrkja økini í landinum við m.a. at leggja málsøki út til kommunurnar, støðugt útbyggja samferðslukervið og eggja til frambrot um alt landið
- at virka fyri javnstøðu í øllum samfelagsins liðum

harafturat heitir flokstingið á sitandi landsstýri um:

- ikki at binda Føroyar í nýggja heimastýrisskipan við Danmark
- ikki at tøma alla uppsparing føroyinga í Landsbanka Føroya
- ikki at fara undir beinleiðis rakstrarstuðul til vinnulívið aftur
- ikki at veita skattalættar á 240 mió. kr. til tey hægstløntu, samstundis sum skerjingar verða gjørdar innan nógvar týðandi vælferðartænastur
- heldur at leggja alla tíð og orku í at menna samfelagið, soleiðis at Føroyar veruliga vera millum fremstu lond nú og komandi, sigur flokkurin at enda í yvirlýsing eftir flokstingið hetta vikuskiftið.

# Tjóðveldið fingið nýggjan oddamann

**Á flokstinginum í Sumba um vikuskiftið, vann Hallur Ellingsgaard valið um at gerast nýggjur aðalstjórnarformaður í tjóðveldisflokkinum**

FLOKSTING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tjóðveldisflokkurin hevur fingið nýggjan aðalstjórnarformann.

Tað varð er greitt, nú flokkurin hevur floksting í Sumba hetta vikuskiftið.

Eitt tað fyrsta á skránni á flokstinginum fríggjakvøldið, var at velja nevndir og tá boðaði formaðurin í aðalstjórnini, Jóannes Dalsgarð, frá, at hann tók ikki vil afturvali.

Hann helt ikki, at hann hevði neyðugu tíðina til at taka ein so virknan lut í floksarbeiðnum sum ein formaður eigur at gera.

Hann vísti á, at stórarbeiðið stendur fyri framman eftir at floksarbeiðið hevði verið nógv darvað av innanhýsis ósemjum seinastu tíðina.

Tí helt, at at tað var rættari at onkur annar kom framat.

Tvey uppskot vóru til aðalstjórnarformann: Hallur Ellingsgaard úr Oyndarfirði og royndi politikarin, Heini O. Heinesen úr Kunoy

Tá ið atkvøtt varð, fekk Hallur Ellingsgaard 22 atkvøður ímóti 14 til Heina og sostatt er nýggi formaður í aðalstjórn tjóðveldisfloksins úr Oyndafirði.

Annars vóru ongar broytingar í leiðsluni og hini í starvsnevnd floksins eru Áki Jacobsen, peningarøkil, Áki Andreasen, skrivari, Høgni Hoydal, Karsten Hansen, Heidi Petersen og Kristina Háfoss,

Hallur Ellingsgaard er 52 ára gamal. Hann er lærari í Oyndafirði.Hann hevur verið nevndarlimur í Eysturoyar Tjóðveldisfelag í 20 ár og formaður hesi bæði seinastu árini. Hann hevur eisini royndir úr bygdaráðnum í Oyndafirði, eisini sum formaður.



*Hallur Ellingsgaard úr Oyndafirði er nýggjur formaður í aðalstjórn tjóðveldisfloksins*